DAGSINS MEINING

Rækjuflotin og útflagging

Tað frættist, at rækjutrolarin Arctic Viking skal undir fremmant flagg. Hesin trolari var ein av teimum, har ungir menn tóku seg saman miðskeiðis í áttatiárunum, og við landskassans hjálp kom skipið í flotan. Saman við fleiri øðrum, var hetta eitt av skipunum, ið helst aldrin hevði komið í føroyska flotan uttan landskassaveðhald.

Veðhaldstíðin er farin, hóast júst hetta skipið var ein av sólstrálusøgunum við í fleiri ár at verða av frægastu í føroyska flotanum.

Nú er vent í holuni. Skipið er eitt av teimum, ið fekk eftirgivið skuld í 1999 frá somu samgongu, ið letst verða ímóti øllum stuðuli. Hendan skuld verður endaliga eftirgivin eftir ávíst áramál. Nú flaggar skipið út, og so er spurningurin, um landskassin eigur at eftirgeva skuld til skip undir fremmandum flaggi.

Væl er raksturin undir føroyskum flaggi dýrur, men har fylgja eisini nøkur frammihjárættindi við. At flagga út má merkja, at sersømdir frá landskassanum fella burtur, og tað sama við kvotum og fiskidøgum eitt nú í Eysturgrønlandi og í Newfoundlandi, ið Føroya Landsstýri hevur forhandlað vegna egnan flota.

Føroyingar hava fyrr roynt at riðið á tveimum hestum. Hvør minnist ikki loynikróksbátarnir við alverðsins eksotisku fløggum, ið føroyskir spekulantar mannaðu, fyri at sleppa undan gjørdar avtalur, ið føroyskir myndugleikar vóru bundnir av? Tá stóðu myndugleikarnir tíbetur stinnir, men hvussu verður nú, tá Fólkaflokkurin ræður fyri borgum?

Hentleikaflagg er ikki loysnin hjá rækjuvinnuni. Tað er løgið, at eingin hevur tosað um at økt eginpeningin í hesum skipum, talan er um. Hava eigarnir ikki sjálvir ráð, so eru møguleikar aðrastaðni. Gongur hetta ikki, traðka konkurslógirnar til, hóast hetta sjálvsagt er harmiligt fyri allar partar. Ein húsagangur ger ikki so stóran mun fyri føroyska samfelagið, um alternativið er útflagging.

Í Grønlandi finst ein fastlønarskipan við bonus umborð á grønlendskum trolarum. Har sigla nógvir føroyingar, og trívast teir væl har. Hví ber ikki til at tosa um eina slíka skipan í Føroyum? Ein slík skipan hevði hjálpt fiskimannin í sløkum tíðum, og lætt um raksturin hjá reiðarium við jøvnum hýrum, og øktum inntøkum í góðum tíðum. Tað er í hvussu so er løgið, at slíkt ikki so mikið sum verður tikið uppá tungu, tá nú feløg finna uppá at fara undir hentleikaflagg.

Rækjutrupulleikin snýr seg ikki bara um flotan, men eisini um rækjuvinnu á landi. Yngru liberalistarnir vilja helst siga, at eitt virki á landi kann keypa og selja rækjur frá hvørjum, tað vil og til hvønn, tað vil, sjálvt um føroysku skipini eru burtur. Hevði heimurin bara verið so einfaldur! Triðjalandsproblematikkurin ger, at naivir politikarar, ið halda at EU og øll lond annars eru rættvís og handla eftir marknaðartreytum, koma at gera meira skaða enn gagn.

Hvat loysnin í rækjuvinnuni er, er ov tíðliga at siga, men tað má átalast, at eingin í kjakinum hevur nortið við hýruskipanina og krav um økta eginogn t.d. við breiðari eigaraskara.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Bræv til løgtingið

OPIÐ BRÆV
Erling Simonsen, form. í Føroya Nátúruverndarfelag

Til
Føroya Løgting
Edmund Joensen,
løgtingsformaður
100 Tórshavn

Tórshavn 15. september 2003

Viðv. løgtingsins góðkenning frá 1993 av sáttmálanum um tryggjan av lívfrøðiligum margfaldni, Convention on Biological Diversity, og verkætlan landsstýrisins til nýggja samferðsluhavn á Trongisvágsfirði.

Føroya Náttúruverndarfelag, FNU, loyvir sær við hesum at kunna tygum og løgting, at landsstýrið við vinnumálaráðnum sum byggiharra, við ætlaðu plasering og bygging av samferðsluhavnini á Trongisvágsfirði, kemur at fremja brot á løgtingssamtykt frá 1993 um góðkenning av altjóða sáttmálanum um tryggjan av lívfrøðiligum margfaldni.

Sambært sáttmálanum skulu øl lond gera tjóðarætlanir fyri varðveitan av djóra- og plantusløgum, vit skulu friða økir av serstakum týdningi, og vit skulu fremja umhvørvisárinsmetingar í samband við størri verkætlanir.

Í 1997 staðfesta útlendskir granskarar í samstarv við Biofar, at sjáldsamur tari, ikki funnin í Føroyum áður, finnist í økinum við Lítla Hólm á Trongisvágsfirði. Kanningar vóru seinast í 1987, og var tarin, nevndur Fugus serratus, tá ikki at finna á okkara leið.

Havnalagið er lagt soleiðis, at nøgdin av gróti verður avmarkað sum mest við at nýta innara part av Lítla Hólmi sum ífyllu til grótkastið. Úrslitið er at sundið millum hólmin og land, ið er 4-6 metur djúbt og 70 metur breitt, verður lokað. Streymviðurskiftini í vikini og kring hólmin broytast stórliga, og vil tað hava við sær árin og broytingar á alt djóra- og plantulív í økinum. Lívfrøðingar siga, at við sjáldsomum plantusløgum fylgja ofta sjáldsom djórasløg.

Brot er ikki enn framt á løgtingssamtyktina frá 1993, og er tí kannað eftir, at umleið 50 metur frástøða til hólmin vil nøkunlunda tryggja óbroyttum streymviðurskiftum.

Vísandi til, at einki er gjørt við uppfylging av sáttmálanum, og at vinnumálaráðið, um ikki annað verður gjørt, innan leingi kemur at bróta nevndu løgtingssamtykt, verður biðið um, at tygum, sum formaður fyri løgtingið, kunna bera so í bandi, at landsstýrið og vinnumálaráðið fáa boð, at løgtingssamtyktin um tryggjan av lívfrøðiligum margfaldni skal haldast.

Avrit er sent til Anfinn Kalsberg, løgmann, Bjarna Djurholm, landsstýrismann og Eyðun Eltør, landsstýrismann við umhvørvismálum.

Burtur við biograf-steðginum

Eydna Iversen Lindenskov

Hvat er sum at fara í biograf til ein góðan film, ikki so nógv!!..

Tá vit meira tilkomnu endliga hava tikið okkum saman, fingið hendur á barnagentu og annars lagt alt til rættis, so at vit eina løtu kunnu gloyma dagsins strev og frítt kunnu reisa inn í ævintýrheimin, fullfermd við flógvum popkorni í føvningnum fyri síðani at skora afturpartin niður í teir reyðu fjálgu stólarnar í Havnar bio, so er alt nærum fullkomið. Ella er tað nú tað? Eitt sum irreterar markleyst, er at mitt undir filminum (oftani mitt í sjálvum klimaksnum í filminum) verur tú nærum skraddur upp við rót. Filmurin verður sløktur, ljósið verur tendra, hurðarnar lætnar upp á viðan veg og fólk í hópatalið fara at røra uppá seg. Fleiri fara niður undir at keypa, onnur strekkja sær beinini, meðan tey seinastu, ið ikki hava bindindi til at sita, stilla seg í hurðina at roykja, so at restin er um at kvælast í royki.

Altso álvaratos, er tað ikki uppá tíðina at betra um hesu viðurskiftir, so at vit seriøsu biograf gangarar, sum ynskja at fáa eitt gott filmsupplivilsi kunnu fáa nakað fyri tær krónurnar, sum tað eftirhondini kostar at ganga í biograf.

Sjálv eri eg javnan í biograf tá er eri uttanlanda, har er tað altíð filmurin, ið er settur í hásati. Slíkt rumisterelsi við keypi og royking, sum hesi upplivir ein ikki uttanlanda, uttan so at talan kanska er um ein langfilm (3 tímar) og tá er tað sjálvandi heilt nakað annað.

Nú skal eg ikki bara skjóta við skørpum eftir tykkum í Havnar bio. Tit eiga rós uppiborið fyri at verða rættliga skjótir við tí síðsta nýggja og áhugaverda innan filmsheimin. Tit hava javnan frumframførðslur ájavnt við aðrar biografar úti í heimi og tað haldi eg er flott fyri ein so lítlan biograf, sum Havnar bio. Men gott í tykkum, gloymi nú ikki endamálið hjá teimum flestu, ið ynskja at fáa eitt gott biograf upplivilsi. Latið vera við at kíla steðgir inn í ein film, tað tænir ongum endamáli, tí tey flestu ogna sær kortini skúmbananir og gummibamsirinar áðrenn filmurin byrjar. Og tey fáu, sum vóru sein at keypa inn til hátíðarløtuna, klára uttan iva at halda sær í hálvan annan tíma, ella tað sum ein stuttfilmur varar.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Vit eru samd: Bussleiðin er ónýtilig!

Herfyri hava lesarabrøv verið um bussleiðina í Tórshavnar Kommunu. Vit eru fleiri, ið taka fult undir við hesum atfinningum. Nýggja skerda bussleiðin er als ikki nøktandi! Tíðarkarmurin er so mikið tepur, at tíðirnar ikki kunnu haldast, sjálvt um ferðin mangan er alt ov høg. Harumframt slepst bert til avmarkað øki, og tískil ber alt ov ofta ikki til at nýta leiðina.

Størstu vansarnir eru hesir:

Eingin føst tíð, ið bussurin fer frá staðnum
Taka vit steðgiplássið við Mannbrekku sum dømi, so kann ójavnin vera 10 min., tá ið bussurin kemur. Í skránni stendur ein tíð nevnd við niðara steðgiplássið ("Studentaskúlin") fimm min. yvir hálvgum ella tíma. So kundi ein roknað við, at bussurin var við Mannbrekku 1 til 2 min. áðrenn, men so er ikki. Bussurin kemur stundum 00 (ella 30 um tað er hálvgum) ella fimm min. yvir, ella kann klokkan gerast 10 min. yvir. Ein hevur sostatt ikki nakran møguleika til at finna út av, um bussurin er farin ella ikki, um ein gongur eftir skránni. — Vit hava fingið at vita, at tað er av teirri orsøk, at ov lítil tíð er, tá ið bussurin skal niðan í erva, og ov nógv tíð er, tá ið bussurin skal omanaftur. Harumframt er rutan ein part av degnum longri, tá ið skúlakoyring er, og tá er bussurin seinni á veg. T.v.s. at leiðin er ikki nóg væl uppsett frá byrjan, og tað hevur við sær "flótandi" stegðitíðir, sum er sera ómøguligt at liva við til dagligt.. Soleiðis er eisini aðrastaðni í býnum. Tað hevur verið upplýst fyri brúkara, at tíðirnar eru "vegleiðandi". Vit vilja leggja dent á, at tað ber ikki til at hava eina bussleið við "vegleiðandi" steðgitíðum, tí so veit ein ongantíð, um bussurin er farin ella ikki. Tað ber til at liva við at bussurin er ov seinur, men at hann ofta er 3-5 min. ov tíðliga, kann ein ikki liva við.

Nærum eingin samskipað koyring í miðbýnum
Av teirri orsøk at so fáar leiðir eru, er sera trupult at sleppa viðari úr miðbýnum.

Eingin samskipað koyring uppi á Hálsi
Tað ber ikki til at skifta millum leið 2 og 3, um ein skal eina aðra leið. Vit vilja gera vart við, at fólk skulu ikki bara aftur og fram, júst sum ein leið koyrir ! Bussurin má eisini kunnu nýtast eitt sindur viðari, tá ið ein skal ørindi. Helst skal bussleiðin vera eitt sindur liðilig, so ein kann skifta ymsastaðni í býnum.

Eingin samskipað koyring á Vegnum Langa
Tað ber ikki til at skifta millum leið 2 og 3 á Vegnum Langa. Tað er sera óheppið, tí skerd koyring er ein part av degnum. Eitt nú slepst ikki frá Hvítanesvegnum og niðan á Løgmannabreyt uttan fyri skúlatíðirnar og heldur ikki ber til at taka leið 2 og so náa leið 3 uppi á Vegnum Langa, tí tá er leið 3 longu farin.

Óheppin koyrileið
Úr Hoyvik (niðara ruta) slepst ikki í svimjingarhylin, til Læknamiðstøðina í Gundadali ella í SMS beinleiðis. Um vit skulu tað, so er neyðugt at koyra niðan á Hvítanes fyrst og allar síðuvegirnar har. Ein kann ikki seta tíð av til at sita útivið ein hálvan tíma í bussinum. Tað gevur heldur onga meining, tí tað tekur styttri tíð at fara til gongu oman!

Eingin koyring kl. 17.45 til Hoyvíkar
Tað er sera óheppið, at eingin túrur er kl . 17.45 (áður: 17.48). Vit eru mong, ið sita sum ryssa yvir deyðum fyli og bíða, tí ikki slepst niðan henda túrin. Hetta er serliga óheppið hjá teimum, ið arbeiða til kl. 17.00 ella kl. 17.30, tí tað er ein risastórur munur á at vera heima kl. hálvgum seks og kl. hálvgum sjey!. Tað má bera til at seta henda túrin innaftur!

Vikuskiftiskoyringin
At koyringin varð skerd um vikuskiftini er sera óheppið. Foreldur eru mangan ovbyrjað av skula koyra børn og ung aftur og fram. Tað má bera til at slepja oman og niðan úr býnum leygar- og sunnukvøld. Harumframt skuldi verið byrjað ein tíma fyrr at koyra sunnumorgnar, t.d. kl 9.30, so fólk kunnu fara við bussinum í svimjingarhylin.

Ov fá steðgipláss
Hetta er ikki nakar nýggjur trupulleiki. Vit vilja kortini gera vart við tað her, at einki steðgipláss er millum steðgiplássið "Studentaskúlin" og áraka Pf. Poul Michelsen.

Ferðslan sum heild: Miðbýurin er ovbyrjaður av ferðslu. Fólk fáa ikki sett bilin frá sær í miðbýnum. Nógv mugu — eisini tey illa gongdu - seta bilin frá sær t.d. uppi við sjónleikarhúsið. Tí hevði verið best at fingið so mong sum møguligt at nýta buss.

Skerd koyring part av degnum
Vit mæla til, at í arbeiðstíðini mugu bæði leið 2 og 3 koyra sum í skúlatíðini, tí tað bert ikki til at skifta ímillum leiðirnar, tí tær eru ikki samskipaðar.

Orsøkin til, at bussleiðin varð skerd, skuldi vera sparingar. Vit vildu mett, at tað er kostnaðarmikið at hava eina bussleið, sum so fá fólk nýta sum nú! Henda broyting er eftir okkara tykki ein framúr góður háttur at fáa fólk til at gevast við at nýta buss.

Vert er at minna á, at bussleiðin helst skal vera so væl skipað, at hon skal vera ein valkostur hjá fólki, so ikki er neyðugt hjá øllum at hava bil. Alla aðrastaðni uttan um okkum verða almenna ferðslan útbygd — her verður hon skerd.

Farið varð undir at skipa bussleiðina fyri sløkum 25 árum síðan. Í hesum tíðarskeiði man fólkatalið í Havn vera vaksið við einum 5-6.000 fólkum, tí er eyðsæð, at bussleiðin átti at verið útbygd í staðin fyri skerd.

Fyri at fáa eina nøktandi ferðaætlan hevði tað verið best at tikið bussførararnar við upp á ráð, tí teir kenna farleiðina best og kunnu koma við konstruktivum loysnum.

Vinaliga
nakrir borgarar í Hoyvík
Marjun Arge Simonsen
Bozena Rasmussen
Valdemar Dalsgaard
Annleyg Paturssón
Sólrun Hovgaard
Niels Jacob Hovgaard
Lív A. Simonsen
Mira Dalsgaard
Malfríð Dalsgaard
Hilda Larsen
Hanus Vang
Vivi Vang
við fl.

Viðmerking til Tummas Eli H. Joensen: Vegurin Skála-Strendur

Kári P. Højgaard
løgtingsmaður

Eftir at hava verið burturstaddur siti eg og lesið bløðini, og eri komin til eitt lesarabrævi hjá Tummas Eli Høj Joensen av Strondum. Í brævinum, sum viðgerð vegin Skála – Strendur, verða spurningar settir og teir fýra samgonguflokkarnir nevndir saman við trimum navngivnum samgongulimum. Í staðin fyri at Tummas Eli saman við okkum, sum veruliga ynskja vegagerðina framda, fegnast um, at samgongan í hesum føri hevur megna at halda vallyftini og arbeiðið gongur sína gongd (brúgvagerðin útboðin), er bert ein negativur tóni at hóma. Torbjørn og Kári P, ið búgva á eystara armi á fjørðinum, fáa hesa heilsanina; citat:

Nú skulu hesi valevnir ikki føla seg so ógvuliga illa, tí ein og hvør veit, at er valið millum ein veg í bygdini hjá tingmanninum og okkara veg, eru vit ikki so góðtrúgvin at halda, at okkara vegur verður tikin fram um tann lokala bygdavegin.

Danir hava eitt orðafelli sum sigur: "Hensigten helliger midlet." Eg dugi ikki við mínum besta vilja at síggja hvussu Tummas Eli við skriving síni gagnar málinum, við at sáa iva um trúvirði í virkinum hjá valdu løgtingsumboðunum. Tí sum tú sjálvur veit eru tað eru hesir, sum saman við øðrum góðum kreftum á løgtingsfiggjarlógini higartil hava borið Skálavegin ígjøgnum og framhaldandi fara at gera tað, til vegurin er liðugur.

Sjálvstýrisflokkurin hevur fingið eitt umboð á løgting, og tað skal ikki verða nakar ivi um, at hann fer at virka eftir bestu sannføring fyri menning og framburði í øllum landinum. Tað sama er galdandi fyri landstýrismann floksins.

Mótmæli

Vísandi til almenna fundin sum Javnaðarflokkurin fyriskipaði í Suðurstreymoy mánakvøldið 29. september.

Í kunngerðunum, sum hava verið í Útvarp Føroya um áðurnevnda fund verður upplýst, at umframt partarnar á arbeiðsmarknaðinum, luttaka løgføðingar, búskaparfrøðingar og umboð fyri politisku flokkarnar. Í Føroyum eru seks flokkar umboðaðir á Løgtingið og hava bert teir fýra flokkarnir, sum hava meir enn eitt umboð, fingið tilboð um at luttaka.

Tað stendur sjálvsagt Javnaðarflokkinum, sum skipar fyri fundinum frítt, hvørjum teir bjóða við, men tað er ein niðurgerð av hinum flokkunum, tá ein av lýsingini fær tað fatan, at allir politisku flokkarnir eru umboðaðir.

Vegna Sjálvstýrisflokkin
Kári P. Højgaard

Eldrapolitikkur

Hey Daniel J. Thomsen

Tað er altíð áhugavert at lesa tey ymisku sjónarmiðini, sum menn og kvinnur skriva um tað sum pensjónistar hava rætt til. Soleiðis eisini tygara greinar.

Vit hava kannað hetta mál hjá landsins myndugleikum, um hvussu tað er við hesum peningi sum landsstýrismaðurin í figgjarmálum hevur koyrt í Landsbankan.

Og vit hava fingið svar og svarið kemur í pensjónistablaðið Sólsetur, sum kemur út í oktober og sum verður sent øllum pensjónistum sum eru limir í Landsfelagnum.

Nú veit eg ikki, um tygum eru limir í nøkrum lokalum pensjónistafelag, um so er, so fáa tygum eisini blaðið, um ikki, so vilja vit senda tygum eitt eintak.

Tygum nevna, at tað eru yvir 7.000 pensjónistar í Føroyum. Ja, men tað eru einans millum 1.100 og 1.200 sum eru skrásettir limir. So vit pensjónistar hava tann allarstørsta feilin. Tað nyttar einki at tosa um maktfaktorar í landinum, tá ein stendur uttanfyri felagssamanhaldi, tá hava teir lítið at siga, enn minni at útrætta.

Eg var á einum fundi í Svoríki saman við nógvum pensjónistum. Har helt ein pensjóneraður lækni eina røðu. Hann segði millum annað: »At vit pensjónistar hava allan feilin, vit bara grenja at einki blívir gjørt, men vit ikki so frætt tíma at tekna okkum í eitt lokalfelag. Hann helt áfram, at um vit høvdu stilla ein pensjónistaflokk upp til komandi val, og vit høvdu valt hann, so kundu vit sett bæði ein og annan ráðharra, men tað gera vit heldur ikki«.

Daniel, set nú fyri, at øll hesi 7.000 pensjónistarnir vóru við í landsfelagnum, tá hevði tú fingið eina broyting at síggja mótvegis okkara lóggevandi tingi.

Ver tygum við at fáa fleiri og fleiri at tekna seg í eitt ella annað lokalfelag. Hav tað gott Daniel.

Vinarligar og blíðar pensjónistaheilsanir
Símun P. Poulsen
skrivari hjá Landsfelag Pensjónistanna